LM-035/2023

Fylgiskjal 2

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Tórshavn 1. november 2023

Avleiðingar fyri Sjúkrahúsverkið um eingi undantøk verða latin

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur í dag tann 1. november 2023 boðað Sjúkrahúsverkinum frá, at felagið ikki letur fleiri undantøk aftaná kl. 16.00 í morgin, hósdagin 2. november.

Avleiðingar fyri virksemið í Sjúkrahúsverkinum
Tá verkfallið tók seg upp, greiddu vit í skrivi hin 29. september 2023 frá avleiðingunum fyri virksemið í Sjúkrahúsverkinum, um eingi undantøk vórðu latin. Hendan støða er nú komin eitt stórt fet nærri. Niðurstøðan hjá okkum er hin sama:

- Verða ongi undantøk latin, kunnu vit sum leiðsla ikki garantera sjúklingatrygdina á teimum trimum sjúkrahúsunum.

- Verkfallið hevur við sær, at fleiri enn 300 sjúkrarøktarfrøðingar ikki koma til arbeiðis. Sjúkrahúsverkið kann í neyðstøðu heita á tilsamans 18 tænastumenn um at hjálpa til á ymsu deildunum, men givið er, at tann hjálpin er stokkut. Talan er bert um fáar tímar, at tænastumenninar tryggja, at deildirnar ikki eru manntómar.

- Verkfallið fer at raka alt tað heilsufakliga virksemið í Sjúkrahúsinum sera meint og tænastumenninir kunnu sum nevnt, bert tryggja, at deildirnar ikki eru manntómar í nakrar tímar. Somu tænastumenn hava tó ikki førleikar, til at røkja dagliga og eiheldur akutta virksemið einsamallir og tískil verður støðan lívshættislig beinanvegin kl. 16.00 hósdagin 2. november 2023.

Gongdin til nú

Beinanvegin tá nýggja fráboðanin frá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar kom, vóru sjúkrahúsleiðslurnar á fundi at fyrireika eina støðu uttan undantøk á verkfalsraktu deildunum. M.a. er ein ætlan gjørd fyri hvørjir tænastumenn eru tøkir og hvar hesir koma at vera. Eisini fingu leiðslurnar boð um at meta um og útskriva teir sjúklingar, sum tað yvirhøvur ber til at útskriva, og annars tillagað alt virksemið, so sjúkrahúsini eru so fyrireikaði sum gjørligt uppá eina eina neyðstøðu.

Í morgin er júst ein mánaður síðani, at verkfallið hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar byrjaði. Byrjað varð á seingjardeildunum á teimum trimum sjúkrahúsunum og síðani er verkfallið støðugt hert til at fevna um mest sum allar deildir í Sjúkrahúsverkinum. Uttan undantøk er stórur vandi fyri sjúklingatrygdina. Harafturat hevur verkfallið longu haft tað neiligu ávirkan, at planlagda virksemið er mest sum steðga og tað merkir, at bíðilistarnir eru longdir.

Vinarliga
Steinar Eirikstoft, forstjóri

[redacted]